# Talgildað av / Digitaliseret af / Digitised by

LANDSBÓKASAVNIÐ

NATIONAL AND UNIVERSITY LIBRARY
OF THE FAROE ISLANDS

Tittul: **Frýðka um búgvið**

Høvundur(ar) / Forfatter(e) / Author(s):

**Helena Patursson**

Útgávuár og staður / Udgivet år og sted / Publication time and place:

**1912 / Tórshavn**

Stødd / Fysisk størrelse / Physical extent:

**20 síður**

## FO

Verkið kann vera vart av upphavsrætti og í slíkum føri kann PDF-fílan bert nýtast til persónligt brúk. Um høvundurin er deyður fyri meira enn 70 árum síðani, fellur upphavsrætturin burtur, og verkið verður alment og kann tá nýtast frítt. Um fleiri høvundar eru, er tað deyðaárið hjá tí, ið livdi longst, sum er galdandi. Minnist til altíð at vísa til høvundan.

## DK

Værket kan være ophavsretligt beskyttet, og i så fald må PDF-filen kun bruges til personlig brug. Hvis det er mere end 70 år siden, at ophavsmanden er død, er værket fri af ophavsret (public domain), og så kan værket bruges frit. Hvis der er flere ophavsmænd, gælder den længstlevendes ophavsretsmands dødsår. Husk altid at kreditere ophavsmanden.

## UK

This work may be protected by copyright, in which case the PDF file is for personal use only. A work enters the public domain if its author has been deceased for more than 70 years, after which it may be used freely. For works with multiple authors, the copyright term is based on the death of the last surviving author. Always make sure to credit the author.

f 64.5
Pa698
f

H. Patursson

Fryðka um búgvið

Helena Patursson:

# Frýðka um búgvið

Tórshavn
Í prentsmiðju »Fram«s
1912

6432

Helena Patursson:

# Frýðka um búgvið

Tórshavn
Í prentsmiðju »Fram«s
1912

FØROYA AMTS BÓKASAVN
TÓRSHAVN

Einki er vakurt, utan tað er hent.

Tað er eitt, ið íðiliga verður haft á lofti nú á døgum, og tað er um at fremja heimayrki og vekja ans fyri sannum vakurleika innanhýsis.

Eitt hugnaligt búgv er sett á tann hátt, at húsið er vælbygt og fjálgt, — ikki pinnaverk við gjóstri og lekum, so skjótt sum tað lotar væl og æl er av himli. Nei, tað nýtur at vera hóskandi til landsins veðurlag og viðurskiftir, húsins fólk og teirra livikor.

Læknini í okkara tíð prædika javnt og samt: Halt ikki stovur bert til stás og so nøkur smárum til at tyrpast saman í undan kuldanum vetradag, men liv dagstøðugt í øllum húsinum; hav tøtt, ljós og rúmlig verilsir, og ber ræðslu fyri innibyrgdari luft, tí hon ger teg sjúkan.

Allur húsbúnaði eigir at vera til nyttu og prýði í senn; einki eigir at kennast

sum einans verandi til ífyllu; skapilsi skal vera hent og litirnir vakrir.

Eg fái mær sess, sum eg kann nýta góða hvíld í, eitt rúmligt borð, sum er til at arbeiða á, og eg keypi mær mynd, ið eg kenni væl og sum eg havi eitt ella annað áminnilsi um, so tað er mær til uggilsi, men ikki fyri at hvør maður skal »beundra« tað.

---

Tað er tann siðurin, tankaleyst at fylgja »skikki og brúki«, ið ger tey allarflestu heimini hjá okkum so »ópersónlig«, at einki sermerkt er at finna í teimum.

Lítið hevur virði hjá okkum, uttan at tað er keypt stás. Vit keypa fegin húsbúnað frá presti og fúta og skrivara, sum teir ikki hirða at fara út av landinum við, og seta so hesar »møplarnar« til at flenna í stovum okkara, har teir hóska sum flokshattur til skjúrt og troyggju.

Arne Garborg sigir í »Den norske heimen« um landsmen sínar, ið hava misrøkta teirra gamla kultur og tjóðskapliga kunst:

. . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .
stólar úr Wien, ost úr Haag,
tað eigir at vera eitt fragari slag!
Knívar úr Svøríki, ull úr Edinburgh,
fransk korset og sweitsar-ur,
toy úr Hamborg, snús úr Rotterdam,
øl úr Týsklandi, sýl frá Køpinhavn.
Skjótt er bóndin fínur sum Parisarmaðurin,
tað finnist einki norskt á garðinum,
plógvin er eingilsk, saksan amerikansk,
arbeiðskonan svensk og tungan bronglar
danskt;
hann keypti í húsini fabrikk-gjørt kramm
— heimagjørt at eiga, var einki fyri hann!
Hann helt á við hesum meir og meir,
til stovurnar vóru sum krákureið'r.
Har situr hann nú og trýr hann er ein
maður,
men við hvørt er tað tó, sum han ikki er
glaður.

Mætari man tað ikki vera hjá okkum! Hevur eitt hús í bygdini fingið sær »poleraðar« búnyttur, so helma hini húsini, um tey eru tað ment, ikki fyrr enn tey kunnu apa eftir. Og so alt hitt óskræmiliga

stásið, sum plagar at vera til ífyllu: Sprøglittar lampur, blátt borðklæði, reyð album, rósinlitaðar »visitkorta«-skálir, pastalínsdjór og pappírblómir, óekta metaltoy, smádúkar, hekluteppir, virðisleysar glasmyndir á bróstinum og glansteppir á gólvinum, smástólar við toppsetu, ótrúliga ljót »roykiborð« — ið eru til at velta í koll! — tí ofta er trongt inni, sum i eini krámbúð.

Eitt slíkt búgv kann hvørki vera hugnaligt ella heimligt. Alt stendur so keypt og ónytt — einans til at sýna fremmanda fólki inn til og so kanska til hátíðsbrúk.

Ein slík misfating av, hvussu eitt hugnarligt búgv skal vera, finst eisini í øðrum londum ymsa staðnis, men tað bøtur tó ikki uppá okkum.

Hin lærda svenska frúgvin *Ellen Key* sigir: »Snildir ella kunstur og sannur vakurleiki fær ikki fastan fót innanhýsis, fyrr enn tær ungu kvinurnar gevast við at seyma alskyns smá og nyttuleys håndaverk og ístaðin taka vevstólin og tað natúrligu urtalitingina til tað besta heimayrki.

Føroyskar kvinnur, ið ferðast til »útheimin«, eiga at vinna sær natúrligt skil um kunst og fakurleika við at vitja dúgliga á kunst- og húsflidsframsýningarnar og á forngripagoymslur. Har eru dømir at taka eftir; hvør lutur har hevur sítt at læra okkum.

Vit mannabørn eru so ymisk og hava so mong sinn, — sum betur er! — hví skulu tá øll okkara búgv verða skorin eftir einum tráð?

Tað persónliga, fjálgandi búgvið er altíð sprottið av sjálvhugsandi, fagurtráðandi mannasál.

Danskarin *Daniel Bruun* sigir um Føroya kvinnur millum annað . . . . . »og i Hjemmene ere de ypperlig dygtige.«

Klædnayrki — sum tó ikki her skal umtalast — er mest alt frálíka vælgjørt. So fermar, sum nógvar av teimum føroysku kvinnunum eru við vevinum og rokkinum, stokkunum og nálini, hevði teirra arbeiði komið betri fyri og fingið hægri prís, um tær vóru meiri umhugsnar, og um vit høvdu húsflidsfeløg og høvdu hildið húsbúnaðarframsýningar í Føroyum, sum teir gera í øllum grannalondum okkara.

Um vit eiga væl virkað vevnað — bæði til teppur, gardinur, sessir, borðdúkar, koddar — og vøkur mynstir bæði í ull og lín, so eru tey tó fá, ið hava eitt reiðiliga gott eyga til at fáa litirnar at hóska saman.

---

Tað er sagt frá einum útlendskum hvalabátaskipara, sum er vælkendur her á landi, at hann helt fyrilestrar, táið hann kom aftur til heimlandið vetrardag og røddi tá m. a. um, hvussu ungir føroyingar oyddu burtur dagar og løtur, táið ikki viðraði til útiarbeiði, ístaðinfyri at nýta ta tíðina á heimaverkstað »til gagn og glede for heimen sin«.

Sigir hesin maðurin ósatt.

Og tá var tað tó ikki vorðin siður, sum nú á summum plássum, at dansa 3 kvøld um vikuna — tey tvey kvøldini »snurrudans« — og at spæla kort í krambúðini um dagarnar!

Nógv av slíkum ósiði kann væl arma eitt fólk út!

 Eg havi sæð yrki úr heimaverkstað,

sum var hugnaligt at skoða: bæði til prýði innanhýsis og til gagnlutir utanhýsis. Og eg veit um eitt búgv her í oyggjunum — tað kunna væl vera fleiri —, har *allar* búnyttur eru úr heimayrki: smíðaðar, útskornar, beitsaðar, málaðar, vovnar, baldýraðar, hvørt av sínum.

Peningurin, ið hetta búgvið hevur spart, mundi ikki vera lítil. Og so tað virði, sum eitt tílíkt heim hevur fingið sær í ogn fram um hini, ið hava alt teirra keypt og eftirapað!

Kanska var tað hetta búgvið, ið eitt danskt skald sipaði til, tá tað segði: »Ja, fraregnet den storslaaede, dejlige, lyse Natur med de store Vidder for Øjet er her ikke saa uhyre meget at lægge Mærke til, men ét Hjem har jeg da set paa Færøerne.«

---

Í Svøríki og Noreg er nu urtalitingin uppafturtikin heima. Tað eru forngripagoymslurnar, kunstyrkis- og húsbúnaðarfeløgini, sum kosta tær bøkurnar prentaðar, ið verða skrivaðar um hetta evni, meðan

staturin styðjar hesu feløgini. Umframt at vera uppafturtikin til heimayrki er natúrlitingin vakrari og roynast nógv betur enn hin »kemiska«; tað sæst t. d. á teim hundraðárs gomlu áklæðum og bílætvevnaðum, sum enn eru goymd víða hvar.

»Lærebog i Farvning med Planter« nevnist tann síðsta bókin, ið frammkomin er um hettar evni; hon fæst í Oslo (Kristiania) í *I. W. Cappelens* bókbúð. Bókin er ógviliga lættfør at komast eftir og natúrkønur professari hevur givið frúnni, ið skrivað hevur, sera heiðrandi umtalu.

---

Bæði hent og vøkur eru tey ljósu, seyðalitaðu gólvteppini, sum vit virka, tí tey hóska væl til hvat lit, vit brúka á sessum og á bróstunum, og skarn rýnir lítið við tey. Stórblómut ella stórrútut gólvteppur eru »órólig« og spilla yndi í stovuni.

Hava vit virðandi myndir á bróstinum, tá hóskar tað illa, at pappírið (tapetið) er stórmynstrað ella sprøglutt, tí myndirnar skulu prýða bróstið, og pappírið skal ikki hava loyvi til at leiða eygað avvegis teimum.

Men seta vit stórmynstrað- ella bílætpappír á bróstið í barnakamarinum, tá er tað til stórt uggilsi fyri tað smáa fólkið, ið har skal halda til.

Lín er reinligast og vakrast til seingjargardinur. Ullgardinur við borda, framm við vindeyga og hurðar, eiga at hanga slættar — eins sum bordakappin omanfyri. Skarlaksreyður, tigulreyður, grasgrønur ella broncelitaður heimavirkaður borðdúkur (borðteppi) við breiðum einlitaðum borda er eitt stórt prýði har, tað hóskar við aðrar litir í stovuni.

Eftirfylgjandi litir verða nógv nýttir aftrat hvørjum øðrum í vevnað, baldýring og málningi: Tigulreytt, ljósablátt, døkkari blátt — tigulreytt, ljóst blágrønt, døkkari blágrønt, sóljugult — skarlaksreytt, grasgrønt, døkkari grønt — rósinreytt, blágrønt, mosagrønt, »bronce«.

Men hann, ið sjálvur vil seta sær litir saman og ikki eigir reiðiliga gløggan ans til tað, skal varða seg fyri at nýta nógvar sterkar litir í *einari* stovu.

Eg havi verið hugtikin av at skoða hitandi sól titra inn um branngult vind-

FØROYA AMTS BÓKASAVN
TÓRSHAVN

eygalín á skarlaksreyðan vevnað við ljóst mosagrønum træyrki, einlitað bróst, virðisfullar myndir í gyltari rammu, hvítskúrað gólv, breiða sessir, frískar blómur, blonk keraldir o. s. fr. e.

Sjálvt um tað er reiðilig smákorsfólk, ið reisa búgv — hava tey ans fyri natúrligum fagurleika, so eru tey viss í at fáa eitt hugnaligt og »persónligt« heimbýli, ett sovorið, ið ikki sýnir seg sum eftirapað ella sum lán.

Dimmar og tjúkkar gardinur hóska ikki so væl fram við glasið sum tær bjørtu og lættu. Vit fáa dagsljósið gjøgnum glasið og *ov* ljóst fær eingin tað á okkara dimmu, longu vetrastundum. Men tær ullgjørdu fjálga kortini og vit kunnu hanga tær góða helvt aftur um tær bjørtu. Tað ljóslitaða pappírið á bróstinum frískar eisini upp í okkara grá-gráa veðurlag.

---

Millum ljóst eik- ella mahognitræyrki er eitt hvítt ella ljósagrønt, fíntmálað línskáp — ovara deildin við glashurð til at goyma gott pastalín í — eitt stórt prýði og nógv

»fornemmari« enn mangt eitt buffetskrumbul; stórt virði er eisini í einari fíntmálaðari dragkistu og eitt 8-dags ur í træskápi. Gamalt og sermerkt messing-, kopar- og pastalíns- og leirkeraldir eru vakurt prýði á hyllum, dragkistum og tílíkt. Fløt keraldir: borðiskar, føt, stássteintoy hóska væl á matstovuhyllum. Metalkeraldir, ið standa frammi, eiga til allar tíðir at vera skínandi blonk; er ikki stundir til at blanka tey, er betur at beina tey heilt burtur; tí í hesum sum í øðrum: Betur einki stás enn at tað skal vera misrøktað.

Ovnur, ið ikki er blankur, men stendur og sýnir seg reyður í rusti, sigir eisini frá órøkisskapi og sær ógviliga ófýsisligur út.

Hava vit matstovu og arbeiðsstovu í einum, tá er rúmligt langborð mitt á gólvinum ógviliga hent, tí ein nýtist tá ikki at lata seg órógva í arbeiðinum um onkur kemur seint heim til matnar. Í slíkari stovu eigur at vera stór heingjulampa, sum bæði lýsir og fløvar væl. Niðan til í bróstinum er hent at hava skáp, so at skúlabøkur og handaverk kunnu beinast har inn um.

---

Keyptar búnyttur hava í útheiminnm oftast tann lagnað, at tær vera burtur blakaðar av teim yngru, sum taka við búgvinum, meðan tað prýðiliga, kæra heimayrki verður valað um og nýtt slektarlið aftaná slektarlið. Dýrt og vakurt er ikki altíð eitt. Ein frú í línbúnað kann bera seg yndisligari enn ein onnur í silkiskrúð.

Hin hvítskúraða stovan við línkappa fyri glasinum, blonkum bíleggjarovni, mynstrað seingjarlín, virðisligar smámyndir á bróstinum, fíntmálað ella skúrað træyrki, gamalt steintoy á hyllunum, blonk kerald og frískar blómur, kann vera nógv hugnaligari enn mong borgin við øllum sínum keypta stási.

So sigir hin navngitni svenski kunstnarin *Carl Larsson:* Ein gamaldags stova ella eitt lítið kunstnarbúgv er mest altíð hugnaligari at fáa sær eina hvíld og skemtuliga stund í enn stórborgin við allari sínari dírd. Carl Larsson gav út 24 teikningar í bók sínu »Eitt heim« og allar teikningar eru tiknar eftir hansara víðagitna kunstnarbúgvi »*Sunborn i Dalarne*«, og har hevur hesin málarin og hansara

smábørn í fríløtum frá skúla og øðrum yrki uppdyrkað ein urtagarð úr oyumørk, sum sigist at vera ein tann fagrasti og *nyttigasti*, sum einstakur maður eigir í norðanlondum.

Her skal berast upp nøkur dømir uppá húsbúnaðir, sum tær eru flestar í stórborgum og harrahøllum: *Samlingshøll:* hvítt lakerað — ella mahogni træyrki við gyltum listum og skarlak ella ljósum mosagrønum damask, krystalspegil, marmorborð o. s. f. e. *Frúarstova:* Mahogni træyrki við gulum »damask« og innløgdum prýði m. a. *Harrastova:* Ljóst eik og »modellera« gyldenleður til setur og rygg á sessum. *Sovuhøllir:* Allur búnaður hvítur við gyltari rand og ljósablátt damask. *Tváttistovur:* Málaðar, niðantil grasgrønar og himmalbláar í evra við glitrandi stjørnahimli í loftinum. Enn meiri: *Stáshøllir:* krotaðir búnaðir við perlumori og fílabeini innlagt, ekta forgylling, og silkidamask til klæði her og har, »ibenholt« og ymisligt træyrki við skorið og hándmálað gyldenleður, keraldir og spegil av pastalín, krystal og til fleiri túsund krónur stykkið summu, myndir

til nógv hundrað og nógv túsund stykkið. Ein salurin »empir« annar rococo, triðji renæssance, fjórði Louis XVI o. s. f. e.

---

Eg veit eitt frálíka hugnaligt lítið danskt búgv at taka til; tað stendur á landsbygd tætt við Keypmannahavn, tvey systkin eiga tað; hon hevur sítt yrki á sakførarstovu í Keypmannahavn, og hann sítt á einum apoteki har. Húsið er bygt av stórtimburi, nógvir eru glasgluggarnir, og teir sita mest allir í suðri og eystri, sum vituligt er. Innantil er búgvið stovnað á tann hátt, at hurðar, vindeygakarmar og loft eru blonk, branngul, um alla lonina; og har sæst eingin svartur ovnur, men »fajance« — ella pastalínskaminur. Samlingsstovan, ið ber mosagrønan lit, hevur ljóst eik til búnaðir við tigulreyðum vevnað á, og samaleiðis borðklæðið, sum hevur breiðan, branngulan borda, meðan gólvteppið er litað sum bróstið, stakbúnaðir eru hvítt málaðir og ógviliga smalt grøntrandaðir, eisini av mahogni. Matstovan er av-

lang og hevur tigulreytt bróst, allir búnaðir eru av flættaðum bambusi, ein hyll eftir hvørjari breiddini til at seta stáskeraldir og steintoy á, stórar fagrar blómur eru málaðar runt íkring loftsyllunar, hándvirkaðar hvítar gardinur og hvíttskúrað gólv sæst í hvørjum verilsi summardag, seingjakamarini hava ljósagrønan dám, og har nýtast hvítar búnyttir, grøntrandaðar. Tváttikovin minnur um himmal og jørð (blátt og grønt), um eitt framíhjá verilsi havi eg bara eitt leystligt minni um nakað skarlak — og gullitað; eitt rúmligt gestakamar, sum hevur bjartan dám og sprøklitaðar »bambus«-búnaðir; gangin er hvíttskúrað frá gólv til loft, stórur spegil og beinnaglar, sum einans ferðafólk nýta; tí har stendur breitt skáp, sum vælir og fjalir um yvirtoyið hjá húsins fólki.

---

Hin áðurnevnda frúgvin *Ellen Key* sigir: Hví er tann stutta fløskan við tí tjukka hálsinum ljótari enn tann langa, mjáa? tí tað er tvørligari at skeinkja av tí tjúkku. Hví er tann einlitaði blómu-

steypurin vakrari enn hin málaði? tí tann málaði spillur tær frísku blómurnar, sum eg keypti mær steypin til. Hví kann eg ikki torga eftirgjørdar blómur? tí tær herma eftir teim frísku og natúrligu. Hví er borðiskur vakrastur, tá ið hann einans er prýddur um tromina, men ljótur, tá ið ein genta ella eitt hús er málað í botninum? tí tað er ónosligt at eta oman av einum húsi ella oman av einari gentu.

Við at spyrja seg sovorðin *hví* fær ein ivaleyst gløggari skil millum yndi og misyndi, príði og øvugt stás, hent og óhent, hugnaligt og óhugnaligt.

---

»Skønvirke« nevnist eitt felag, sum varð íbirt stutt síðani í Keypmannahavn, við tí endamáli, at fremja tjóðskapligt handayrki og vekja ans um sannan kunst og fagurleika millum almanna. Á hvørjum ári hava limirnir av hesum felag framsýning úr teirra yrki.

Tílík feløg eru vælkend í útheiminum, og meginparturin av felagslimunum eru fólk,

sum hava teirra breyð úr handayrki, kunstnarir, arkitektar og hartil ríkmenn og samlarir. Vit vita øll eitt sindur um tað blómandi og fagurtelskandi Hálland. Har í *Amsterdam* hava felagslimirnir í teirra »Skønvirke« stutt síðan tikið seg saman um eina merkiliga framsýning — sum á donskum máli rópast fyri »*Hæslighedsudstilling*« — og til tess sankað saman alskyns lættkeyptan moderna kunst, virðileyst kramm og missáttar búnyttir, sum fólk nýta til prýði innanhýsis. Eisini fjákutir klædna mótar vóru har frambornir til skoðar á hesi óskræmuligu framsýning t. d. skorsteinshattar, velafrakkar og bikaðir fingravøttir. Kvinnuhattarnir vóru teir vælkendu: tavur, tunnubotnir og troyggjuermuhýtir. Tilgongurin av fólkið var stórur og harvið bleiv peningurin, ið kom til húsis, rúgvismikil.

Felagsnevndin í Amsterdam heldir sum so, at hendan hermingin — sum einans var vælmeint — eftir missáttum og fagurleysum búgvum bæði hjá múgvandi og fátaka manni vil rýna væl við fólkið og vera til miklan frama fyri felagsmál teirra.

Hetta sama munnu Danir halda, tí nú ætla eisini teir fyrst sum til ber at byrja ein »Hæslighedsudstilling« í »Skønvirke«.

FØROYA AMTS BÓKASAVN
TÓRSHAVN